# HEVUR TÚ HUGA AT GERAST STARVSLESANDI



Kanska verður tú í komandi ári starvslesandi í føroysku miðfyrisitingini ella á okkara sendistovu í Brússel ella London?

Í starvslestrinum fært tú innlit í politisku skipanina og hvussu almenna fyrisitingin virkar. Tú kanst eisini fáa kunnleika um ávíst málsøki í sambandi við lestraruppgávu. Ljóðar hetta áhugavert, kanst tú søkja um at sleppa í starvsvenjing í einum av føroysku stjórnarráðunum ella sendistovunum í eitt lestrarhálvár.

Til tess at søkja, skalt tú lesa á lærdum háskúla, og tað er ein fyrimunur at hava lokið grundútbúgving á bachelor-stigi. Starvslesturin kann, um tín útbúgvingarstovnur góðtekur tað, eisini gerast partur av útbúgving tíni.

Les meira á www.tinganes.fo undir Størv.
Umsóknarfreistin er 17. oktober 2006.

www.sansir.fo

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office





# Verkætlanarfólk til KT menning

**Vit styrkja okkara kt-menningarøkið, og sóknast tí eftir starvsfólki.**

Saman við einum framfýsnum toymi verður tú við til at menna og røkja okkara tryggingarskipanir. Tú kemur at arbeiða nógv við verkætlanum, ið krevja innlit, samskipan og verkseting, og tí mást tú duga væl at samskifta.

Vit nýta tryggingarskipanina, TIA, sum er ein framkomin og altjóða skipan, ið verður nýtt í 40 tryggingarfeløgum í 18 londum kring um í heiminum. Aðrar skipanir, sum vit nýta til heimasíðu, intranet, tilgongdir og hagtøl, eru eisini natúrligur partur av menningarøkinum.

**Starvið**
Vit kunnu bjóða eitt starv, sum fevnir rættiliga breitt í einum spennandi og mennandi umhvørvi. Starvið inniheldur nógvar avbjóðingar, og tú fært møguleikan at ávirka gongdina í einum nýggjum og slóðbrótandi felagi.

Arbeiðsuppgávurnar fevna millum annað um kt-verkætlanir har samskipan, samskifti og íverksetan eru av stórum týdningi.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur arbeitt við verkætlanum og hevur royndir við verkætlanarleiðslu.Tú hevur eina hóskandi kt-útbúgving ella viðkomandi royndir.

Persónliga ert tú fyrikomandi. Tú arbeiðir sjálvstøðugt og ert samstundis ein góður viðleikari. Tú dugir at gera tað torføra einfalt, tú hevur ábyrgdarkenslu og vilt veita eina góða tænastu.

**Setan, umsókn og freist**
Starvið verður sett sum skjótast og lønin verður ásett eftir avtalu í samsvari við royndir og førleika.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi áðrenn 15. oktober 2006.

Send tína umsókn við lívsgongdarlýsing (CV) til:
Tryggingarfelagið Føroyar
att. Starvsfólkadeildin
Kongabrúgvin
Postboks 329, FO-110 Tórshavn

Umsóknin kann eisini sendast við telduposti til: starvsfolkadeild@trygging.fo

Vilt tú vita meira um starvið, kunnu spurningar setast Óluvu Poulsen á telefon 215594 ella teldupost op@trygging.fo. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Postboks 329, 110 Tórshavn
Tel 345600, Fax 345601
tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

*Tryggingarfelagið Føroyar P/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn, og 5 deildir kring landið. Í felagnum starvast 118 fólk.*

sansir.fo



# Havnar Bio

kall Coca-Cola




**World Trade Center** — Frumsýning

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 22.09 | kl. 20.30 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 23.09 | kl. 20.30 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 24.09 | kl. 19.30 | kl. 22.00 |




**Over Hækken** — Undan Frumsýning

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag | 23.09 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 24.09 | kl. 17.00 |




**Biler**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 22.09 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 23.09 | kl. 18.30 |
| Sunnudag | 24.09 | kl. 17.30 |




**16 Blocks**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 22.09 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 23.09 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 24.09 | kl. 22.30 |




**The Sentinel**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 22.09 | kl. 18.30 | kl. 21.00 |
| Leygardag | 23.09 | kl. 21.00 | |
| Sunnudag | 24.09 | kl. 20.00 | |

**Komandi filmur**

**Click**
Fríggjadag 29.09

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**